KARISMA

STÓR BÓKASØLA Í HØLLINI!

# Hvítusunnumøtir


Dánjal á Dul Jacobsen
Tummas Jacobsen
Pauli Høj
Fróðor Dabes
Jón Miðberg
Símun Jacobsen

**UNGDÓMSTILTØK**

Leygarkvøldið 7. juni kl 22 verður spennandi tiltak fyri tey ungu og onnur, sum kenna seg ung, kallað Youth Arise: Sangbólkur, dansibólkur, dramabólkur, lovsongsbólkur o.fl. luttaka við fjølbroyttari skrá.

1. Hvítusunnukvøld kl 22 verður lovsongskonsert í samband við útgávu av nýggjari lovsongsfløgu. Á hesari konsertini luttaka kendir føroyskir solistar saman við United Voices – men við donskum tónleikarum. Fløgan er áður komin út á donskum.



**BØRNINI**
**Tiltøkini fyri børnini verða leygarkvøld, 1. og 2. hvítusunnudag. Byrjað verður í Ítróttarhøllini og síðani verður farið yvir í Rhema.**

**Fríggjakvøld:**
Syngið-við-kvøld kl. 20.30

**Leygarkvøld:**
Evangeliskt møti kl. 19.00
Youth Arise ungdómstiltak kl. 22.00

**1. hvítusunnudag:**
Møti kl. 11.00
Evangeliskt møti kl. 18.00
Lovsongskonsert kl. 22.00

**2. hvítusunnudag:**
Møti kl. 11.00
Evangeliskt møti kl. 17.00

# Í ÍTRÓTTARHØLLINI
á Hálsi

## Yvirlýsing 28. mai 2003

Undirritaðu fakfeløg gera vart við, at støðan á privata arbeiðsmarknaðinum nú er, at verkbann er.

Hetta er støðan eftir tey tiltøk, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tikið við at lata aftur virkir og heilsølur.

Arbeiðsgevarar hava ført fram, at verkfallsblokadurnar eru ikki lógligar, men hetta er ikki rætt.

Nú er sáttmálaloysi og verkfallsvaktir verja bert verkfallsraktu arbeiði síni, so hesi ikki verða tikin upp av øðrum. Fyritøkur, so sum oljufeløg og heilsølur, hava starvsfólk, sum eru limir í fakfeløgum, so limir og fakfeløg verja bert verkfallsrakt arbeiði. So tá Føroya Arbeiðsgevarafelag førur fram, at verkfallsvaktir og blokadur eru ólógligar, so eru hetta púra sum ikki hava hald í veruleikanum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í roynd og veru tikið stig til verkbann og tykist við tiltøkum sínum hava greiða ætlan um at fáa Føroya Løgting uppí trætuna millum partarnar.

Undirritaðu feløg ávara Føroya Løgting ímóti at leggja seg út í samráðingarnar hjá fakfeløgunum. Leggur Føroya Løgting uppí, so fara undirritaðu feløg at seta í verk tiltøk til tess at verja samráðingarrætt okkara.

Almanna & Heilsurøktarfelagið • Blaðmannafelagið • Føroya Arbeiðarafelag
Føroya Handverkarafelag • Føroya Lærarafelag • Føroya Pedagogfelag
Føroya Psykiatrifelagið • Føroya Skipara og Navigatørfelag
Føroya Tekniska Lærarafelag • Fysioterapeutfelag Føroya
Havnar Arbeiðskvinnufelag • Bioanalytikarafelag • Egoterapeutfelagið
Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara
Havnar Arbeiðsmannafelag • Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag • Landsfelag Handverkaranna • Ljósmøðrafelagið
Maskinmeistarafelagið • Økonomafelag Føroya • Postfelag Føroya
Radiografar í Føroyum • S & K felagið • Sjúkrarøktarfrøðingarfelag Føroya
Starvsmannafelagið

Sosialurin 341800

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 588, P/F Guttesen & Staksberg, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 05.05.2003.
**Kapitalur:** Hækking við kr. 2.000.000,00 til kr. 2.600.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 2.000.000,00 við grunshækking
Viðtikið 05.05.2003 at lækka partapeningin við annulatión av egnum partabrøvum sambært § 48b, jvb kap. 7 í P/F-lógini, við kr. 260.000,00 til kurs 100 eftir at proklama er runnin.

*Skráseting Føroya tann 27. mai 2003*

*Kristin Balle*

Lesið Sosialin

## Bókhald

Søkt verður eftir bókhaldara til eina bilasølu í Havn.

Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhaldsarbeiði. Bert eitt fólk er í bókhaldinum, og tann ið settur verður í starvið, má tí hava kunnleika til bókhald og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast so skjótt sum tilber. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Grannskoðarafelag Rasmussen & Weihe (Joen Magnus Lamhauge).

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. juni 2003.

**RASMUSSEN & WEIHE**
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
An associated firm of
PRICEWATERHOUSECOOPERS
Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo

Sosialurin 341800



Tekniski Skúlin Klaksvík

# Handverkari til timbur- og snikkaraverkstaðið

Skúlin sóknast við hesum eftir einum maskin-, bygnings- ella møbulsnikkara til viðlíkahald, umsjón o.a. á verkstaðnum. Arbeiðið umfatar eisini annað viðlíkahald undir húsavørðinum.

Í serligum føri kann roknast við undirvísing á timbur- og snikkaraverkstaðnum.

Arbeiðið verður lønt eftir sáttmála í millum Føroya Handverkarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Tann, ið settur verður, skal vænta at byrja 1. august 2003.

Umsókn við prógvum og viðmælum skulu vera inni, áðrenn 15. juni 2003. Eru aðrir spurningar, so ring til Rúna Heinesen, skúlastjóra.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20 · 700 Klaksvík

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Brúktar maskinur til sølu

Við hesum verða hesar maskinur lýstar til sølu:

| | | |
|---|---|---|
| GL18 Gummihjólslastari | Cat. 950 | árg. 1976 |
| GL12 Gummihjólslastari | Cat. 950 | árg. 1972 |
| GL17 Gummihjólslastari | Cat. 950 | árg. 1976 |
| GL7 Gummihjólslastari | Cat. 966 | árg. 1971 |
| GL19 Gummihjólslastari | Cat. 950 | árg. 1977 |
| T26 Dozari | Cat. D 4 | árg. 1982 |
| HT71 Rennugravari | JCB 3C | árg. 1983 |
| HT76 Rennugravari | JCB 3C | árg. 1985 |
| HT77 Hjóltraktor | Ford 3910 | árg. 1986 |
| HT75 Hjóltraktor | Ford 3910 | árg. 1985 |

Maskinurnar, ið verða seldar fyri hægsta boð, standa á Maskinmiðstøðini í Kollafirði, har tær kunnu roynast og eftirhyggjast.

Nærri fæst at vita frá Rógva Nielsen, goymsluleiðara, á tlf. 422420.

**Landsverkfrøðingurin**

## Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 11. apríl 2003, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 hevur góðkent:

**Smiðjubygning hjá P/F F. J. M. í Runavík**

Góðkenningin liggur almennt frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3112, Sp/f Vígdis, 625 Glyvrar.

**Nevnd:**
**Farin frá sum formaður:** Gudmund Danielsen, 625 Glyvrar.
**Innkomin sum formaður:** Jónleif Danielsen, 625 Glyvrar.
**Farin úr nevndini:** Óli Christian Danielsen, 625 Glyvrar.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Óli Christian Danielsen, 625 Glyvrar.
**Innkomin sum stjóri:** Gudmund Danielsen, 625 Glyvrar.

*Skráseting Føroya tann 28. mai 2003*

*Kristin Balle*

Lesið Sosialin

FØROYA LANDSSTÝRI

**FAMILJU- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

# Fulltrúi til Familju- og heilsumálaráðið

Familju- og heilsumálaráðnum tørvar ein fulltrúa at byrja skjótast til ber.

**Sum fulltrúi í Familju- og heilsumálaráðnum verða uppgávur tínar m.a.** at tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir á familju- og heilsuøkinum, at svara fyrispurningum frá løgtinginum og tulka lógir og reglur fyri stovnar undir Familju- og heilsumálaráðnum.

**Førleikakrøv:**
Tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv ella aðra líknandi útbúgving. Umsøkjarar sum hava aðra hægri útbúgving, men hava arbeitt við gerð av løgum og kunngerðum og tulkingum hava eisini møguleika til at søkja.

Starvsroyndir frá miðfyrisitingini ella aðrar løgfrøðiligar starvsroyndir er ein fyrimunur. Harumframt hevur tú góð samstarvsevni og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Starvið sum fulltrúi í Familju- og heilsumálaráðnum** er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Starvið er sjálvstøðugt, og tú fært góðar møguleikar fyri framhaldandi eftirútbúgving.

Fyri framman standa nógvar stórar avbjóðingar viðvíkjandi lógar- og kunngerðarsmíði á Familju- og heilsuøkinum. Nýggj sjúkrakassalóg, lóg fyri sinnisveik, tubbakslóg, lógir fyri alt íbúðarøkið og aðrar lógir og kunngerðir skulu gerast skjótast tilber.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið ella annað viðkomandi felag. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Familju- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur ráð.
Arbeiðsstaðið er Heilsudeildin við tilvísing til Turid Arge, deildarstjóra.

**Umsókn** við avriti av viðkomandi prógvum og upplýsing um møg. referansur, v.m. skal sendast til:

**Umsókn** við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

**Familju- og heilsumálaráðið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FO 100 Tórshavn.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. juni 2003 kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra tlf. 304045, e-mail: turid@hmr.fo ella Aibritt á Plógv, aðalstjóra, tlf. 304093, aip@hmr.fo

*Familju- og heilsumálaráðið umsitir m.a. sjúkrahúsverkið, heilsuverkið, apoteksverkið, dagstovnaøkið, íbúðarmál og fyribyrgjandi heilsutiltøk.*

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

# Viðv. størvum hjá Fiskiveiðieftirlitinum

Heitt verður á allar maskinmeistarar, ið hava søkt starv hjá Fiskiveiðieftirlitinum um at venda sær til felagið á tlf. 314718.

**Nevndin**